# VARPIÐ




SvF • Mikudag 19. kl. 19.20

## »Sjúkuavgerð 4«

- Nýggj donsk røð við Geisling

Doreen er við barn og komin í 31. viku. Knappliga vísir tað seg, at fostrið hevur mist nógv blóð. Læknarnir á Rikissjúkrahúsinum hava ongatíð sæð slíkt fyrr. Í sendingini leitar sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling eftir einari frágreiðing til, hvussu tað ber til at ófødda barnið hjá Doreen bløðir burtur.

TELEVARPIÐ

Sosialurin

SvF • Sunnudag 16. kl. 20.00

## »Leivssjóð 15«

Gestir í kvøld verða: Demmus Hentze, Benny Samuelsen og Nicolina Beder, øll úr Tórshavn. Gestasolistur: Petur Pólson. Og verturin er sum altíð Leivur Hansen.



Dr2 • Týsdag 18. kl. 20.30

## »Dr2 Tema: Religion...«

- Við Richard Dawkins

Richard Dawkins lýsir trúgv sum eitt virus, sum smittar ættarlið til ættarlið. Vit fara m.a. við Dawkins á eitt evangeliskt »Hellhouse« í USA, har ein kann síggja hvørjar ræðuleikar samkynd og fosturtøkustuðlar hava sær í væntu, hinumegin lívið her á fold.



**Fríggjadagur 14. ,mars 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**